# Takk fyri hesaferð



*Tað hevur hilnast væl, tá Jákup Mikkelsen takkar fyri seg á Svangaskarði*

Mynd: Álvur Haraldsen

*Jákup Mikkelsen hevur spælt seg væl, nú hann noyddist at loysa Gunnar Nielsen av. Mikkelsen segði eisini farvæl við Svangaskarð í fjør, tá Føroyar vunnu á Litava. Nú segði hann aftur farvæl við Svangaskarð – hesaferð við einum javnleiki móti Norðurírlandi í skjáttuni.*

*– Eg takki so aftur fyri meg á hesum sinni, skemtar Jákup Mikkelsen, sum er væl nøgdur við føroyska avrikið.*

*– Vit verða ongantíð settir undir stórt trýst, og vit duga væl at draga ferðina úr dystinum. Serliga vóru vit stinnir í verjupartinum, og vit skulu vera glaðir fyri úrslitið, og ikki minst avrikið, sigur Jákup Mikkelsen, sum spældi sín dyst nummar 68 í gjár.*

uni@sosialurin.fo

# Málið er gloymt

**MÁLSKJÚTTIN Christian Lamhauge Holst hevur gloymt, hvussu hann brádliga kom til møguleikan at leggja Føroyar á odda**



Uni Holm Johannesen

– Eg veit ikki, tavagud. Eg var so glaður, at eg gloymdi alt um uppspælið og skotið beinanvegin, sigur Christian Lamhauge Holst.

Jóan Símun Edmundsson varð feldur á brotsteigarmarkinum, tá Daniel Udsen tilvildarliga og brádliga hevði bóltin fyri føturnar og spældi hin føroyingin úr Danmark. Holst sneiddi tveir mótstøðumenn av og sendi bóltin niður í handara málhorn við vinstra beininum.

– Hetta er eitt fantastiskt úrslit fyri okkum. Teirra spæliskipan við langum bóltum passaðu okkum serstakliga væl, tí liðini stríddust meira um bóltin í luftspælinum enn á vøllinum, sigur Christian Lamhauge Holst.

1921 áskoðarar vóru á Svangaskarði í gjár. Framherjin úr Silkeborg ynskir, at fleiri føroyingar stuðla landsliðnum.

– Tað ert tú meira enn vælkomin at skriva. Stuðulin til føroyska liðið í kroystum støðum er sera, sera týdningarmikil, og tí vóni eg, at fleiri fólk verða til komandi landsdystin, sigur Christian Lamhauge Holst.



*Víkingaleikarin, Erling Jacobsen, leikti sín fyrsta A-landsdyst í gjár, og kom hann serstakliga væl frá uppgávuni*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Tí var Erling við frá byrjan

**DEBUTANTUR Sera óvæntað spældi Erling Jacobsen sín fyrsta landsdyst, tá Brian Kerr ynskti, at hann skuldi røkja uppgávuna sum vinstri bakkur. Landsliðsvenjarin valdi aftur rætt**

Uni Holm Johannesen

Brian Kerr er skjótur at hyggja upp.

– Sást tú ikki tað?, spyr hann aftur og flennir síðan í kíki, tá hann verður spurdur, hví Erling Jacobsen var við frá byrjan.

Verjuleikarin úr Víkingi var millum mest eyðsýndu føroyingarnar á Svangaskarði í gjár. Jacobsen var framúr í verjustøðu, og hann syrgdi fyri, at gestirnir komu sjáldan til innlegg í høgru síðu. Erling Jacobsen hevði tað trupult fyrstu løtuna, men spældi sera sannførandi seinasta tíman av dystinum.

Hendrik Rubeksen hevur røkt plássið seinastu dystirnar, men Brian Kerr metti, at tað var tørvur á eini úrskifting.

– Hendrik Rubeksen hevur spælt sum framherji í fleiri ár. Hann er umskúlaður til vinstra bakk í hesum kappingarárinum, so hann er óroyndur á plássinum. Eg eri ikki ónøgdur við hansara spæl, men hann hevði tað trupult í Slovenia. Tað var eisini tørvur á eini útskifting, tí tað er strævið at spæla tveir dystir eftir fýra døgum, sigur Brian Kerr.

Landsliðsvenjarin hevur leingi havt Erling Jacobsen í huganum sum ein møguligan vinstra bakk.

– Hann er ungur, og tú skal sjálvandi ansa eftir, nær tú tveitir ungar leikarar fyri løvurnar. Erling Jacobsen hevur spælt væl fyri Víking í hesum kappingarárinum, og eg tosaði eisini við Jógvan Martin Olsen, venjara hjá Víkingi, undan dystinum, og løtan var tann rætta. Hann spældi eisini sera væl og sannførandi, sigur Brian Kerr.

Erling Jacobsen sigur, at hann var nervøsur fyrstu løtuna.

– Men eg gloymdi skjótt nervarnar, og eg haldi, at tað gekk væl. Tað var stuttligt at fáa eitt so gott úrslit í mínum fyrsta landsdysti, og serliga framman fyri eina slíkari áskoðarafjøld, sum stuðlaði okkum væl, sigur Erling Jacobsen.

# Besta kenslan hjá dómarum



Mynd: Álvur Haraldsen

*Eiler Ramussen, dómari í Vodafonedeildini, rósar Cyril Zimmermann, sum dømdi dystin í gjár. Rasmussen vísir serliga til málið hjá føroyingum.*

*– Jóan Símun Edmundsson verður feldur, men dómarin letur spælið ganga víðari, og Føroyar fáa mál fá sekund seinni. Tað er besta kenslan, sum ein dómari kann fáa, sigur Eiler Rasmussen, sum heldur, at Zimmermann kom væl frá uppgávuni.*